Oljuvinnufelagið

Ársfrágreiðing fyri 2015

Um felagið

Oljuvinnufelagið er eitt áhugafelag fyri fyritøkur, sum longu eru virknar í oljuvinnuni ella ætla sær virknan lut í hesi vinnu.

Uppgávan hjá felagnum er at útinna felags áhugamál og at verja áhugamálini hjá limunum. Umsiting felagsins er í Vinnuhúsinum.

Tá stovnandi fundurin varð 2. apríl í 2001 vóru tað 27 feløg, sum teknaðu seg sum lim. Í dag er limatalið 32. Í nevndini í Oljuvinnufelagnum sita:

Magni Arge, formaður
Gunnbjørn Joensen, næstformaður
Anja Jacobsen
Jostein Petersen
Eli Lassen

Tiltakslimur er Christian Danielsen

Yvirlit yvir limirnar

Akraberg	PAM Offshore service
Articon P/f	Poul Hansen P/f
Atlantic Airways	Poul Michelsen P/f
Atlantic Supply Base	Radioservice P/F
Damfar P/F	Reyni-Service P/F
Demich P/F	Runavíkar Havn
Faroe Offshore Service P/f	Samskip P/f
Faroe Ship P/f	Skansi Offshore P/f
Ingeniørvirkið Jostein Petersen	Solar P/F
Kemilux	Thor P/F
KJ-Hydraulik	Tórshavnar Havn
Klaksvíkar Sleipistøð P/f	Vest Pack P/F
LM Electric P/f	Vágs Havn
Lundin (Lundin software), Sp/F	Vesturvón P/F
Magn	Virkisráðgeving Sp/f
Meginfelag Búnaðarmanna L/F	Vinnuháskúlin
Offshore Directory sp/f	

Virksemi á føroyskum øki og innan føroyska oljuvinnu

Nýtt útbjóðingarumfar til oljuleiting í 2017

Vinnumálaráðið hevur boðað frá, at um eitt ár verður aftur møguligt hjá oljufeløgum at fáa nýggj loyvi til at leita eftir olju undir Føroyum.

Leitivirksemið hevur verið á føroyska landgrunninum í eini 15 ár, og níggju brunnar eru boraðir - tó uttan lønandi oljufund. Jarðfeingi hevur ta áskoðan, at fleiri øki eiga at kannast, og at góðir møguleikar eru at finna olju í rakstrarverdum nøgdum. Vantandi positiv úrslit frá leitingum higartil saman við stórum falli í oljuprísinum, hava minkað munandi um áhugan fyri at leita eftir olju á føroyska landgrunninum.

Statoil lat herfyri bæði síni leitiloyvi frá sær, so í løtuni eru bert tvey virkin loyvir á føroyska landgrunninum. DONG Energy hevur hesi tvey loyvini.

Tað er ikki avgjørt, nær útbjóðingarumfarið verðu sett í verk, tí bíðað verður eftir at vita, um støðan innan oljuvinnuna sum heild fer at batna í næstum. Ein møguleiki er, at útbjóðingarumfarið letur upp á Faroe Islands Exploration Conference í Norðurlandahúsinum í mai 2017. Jarðfeingi hevur eisini samband við bretskar myndugleikar um møguleikan fyri at samskipa føroysku útbjóðingina saman við teirra *30th round* eystanfyri føroyska markið, sum verður latin upp í mars 2017. Tað er ikki greitt, nær endalig støða verður tikin um føroyska útbjóðingarumfarið.

Tað er kortiniein uggi í leitingarhøpi, at rættiliga stórur áhugi var fyri leitignarloyvum á írska landgrunninum herfyri.

Marknaðarføra føroyskar veitarar

Fyritaksemið innan frálandavinnu í Føroyum er komið á eitt vegamót, nú ongin nýggj leitiboring er fráboðað. Vit kunnu sjálvandi vóna, at rákið vendir, og at næsta boring verður sett í verk í næstum, men útlit eru ikki til tess sum er. Tí er umráðandi at seta onnur tiltøk í verk til tess at varðveita førleikar og virksemið innan oljuvinnuna, hóast lítið virksemið er í Føroyum.

Tískil hevur Oljuvinnufelagið seinasta árið arbeitt við at staðseta Føroyar sum ein maritiman tænastudepil fyri frálandavinnuna og fyri alla skipaferðslu, sum siglir framvið Føroyum.

Tænastuveitingarnar til maritimt virksemið er á høgum støði og stendur mát við somu tænastu í okkara grannalondum. Vit hava, umvegis boringarnar í Føroyum og vitjanini hjá West Hercules, prógvað, at maritima tænastuvinnan í Føroyum er væl og virðiliga kappingarfør á altjóða stigi.

Við tíðini er ferðslan í føroyskum sjóøki nógv vaksin, frálandavirksemið tætt at føroyska markinum er nógv vaksið og útlit eru til stóran vøkstur, tá ferðslan um arktisku landnyrðingsleiðina vónandi tekur dik á seg.

Tað stuðlar eisini uppundir hugmyndina um Føroyar sum tænastudepil, at reglusemið í flogferðsluni er so nógv batnað síðani Atlantic Airways tók í nýtslu nýggj flogfør og flogvøllurin varð longdur. Alt hetta talar fyri at marknaðarføra Føroyar sum ein upplagdan maritiman tænastudepil.

Fyrsta stigið í hesi ætlan var føroyska luttøkan á Offshore Europe í Aberdeen í 2015. Føroyska luttøkan legði dent á fimm høvuðspunkt:

1. Geografiska staðsetingin mitt í Atlantshavinum
2. Vit hava førleikarnar
3. Vit eru fleksibul og nærum allar tænastur eru innan 1 tíma-frástøðu
4. Vit hava kappingarført kostnaðarstøði
5. Vit hava tøkt pláss í havnunum og góðar havnir

Í arbeiðnum at marknaðarføra føroysku veitaravinnuna er heimasíðan www.maritime-services.com gjørd. Heimasíðan lýsir føroysku veitaravinnuna býtt upp í vinnugreinar og fyritøkur. Endamálið við síðuni er, at útlendskar fyritøkur lættliga kunnu finna upplýsingar um føroyska vinnu og fáa greitt innlit í, hvørjir føroysku veitararnir eru, og hvørjar tænastur, teir veita.

Nakað av printaðum tilfari er eisini framleitt til Oljuvinnufelagið og fyritøkur at brúka, tá farið verður á messur og tílíkt.

Oljuvinnufelagið fegnast um, at landsstýrið hevur sett pening á fíggjarlógina fyri 2016 til at marknaðarføra Føroyar sum ein maritiman tænastudepil. Uttanríkis- og Vinnumálaráðið og Oljuvinnufelagið eru samd um, at partarnir arbeiða við sama endamáli og hava tí gjørt av at arbeiða í felag við at varpa ljós á føroysku veitaravinnuna og møguleikar í Føroyum.

Í vár hevði felagið kunnandi fund fyri limirnar um átakið um Føroyar sum maritiman tænastudepil á heimleiðis fundi, og undirtøkan var sera góð.

Virksemi annars

Luttøka á oljumessum

Oljuvinnufelagið hevur ábyrgdina av at samskipa føroyska landabásin á Offshore Northern Seas í Stavanger og Offshore Europe í Aberdeen.

Í 2013 gjørdi Løgmansskrivstovan av, at tey framyvir ikki samskipa føroyska luttøku á oljumessu. Fyrstu ferð Oljuvinnufelagið samskipaði landabásin var í 2014, og avgerð er tikin um at halda áfram við hesum.

Offshore Europe 2015

Offshore Europe var í Aberdeen í døgunum 8. – 11. september 2015.

Hesar fyritøkur luttóku á landabásinum: Atlantic Airways, Atlantic Supply Base, PAM Offshore Services, Føroya Tele, Runavíkar Havn, Tórshavnar Havn og Vágs Havn. Eisini vóru FOIB og Jarðfeingi við á messuni.

Afturgongdin innan oljuvinnuna sæst aftur á luttakaratalinum á framsýningini, men hóast hetta kom tó væl burturúr. Nógv vitjandi vóru á føroyska landabásinum, har føroysku fyritøkurnar hittu kundar og samstarvsfelagar. Útlendsk tíðindafólk vóru eisini áhugað í Føroyum, og tey vildu frætta um oljuboringar, komandi útbjóðingarumfar og veitaravinnuna í Føroyum. Nógv varð somuleiðis gjørt burturúr at marknaðarføra Føroyar sum ein tænastudepil í Atlantshavinum.

Offshore Northern Seas 2016

Offshore Northern Seas 2016 verður í døgunum 29. august - 1. september í Stavanger.

Higartil hava átta fyritøkur/havnir meldað til luttøku á landabásinum. Talan er um: PAM Offshore Services, Atlantic Supply Base, Atlantic Airways, Faroe Ship, Tórshavnar Havn, Klaksvíkar Havn, Runavíkar Havn og Jarðfeingi.

Tórshavnar kommuna saman við Runavíkar kommunu luttekur aftur í ár á festival-økinum niðri við havnina í Stavanger. Skipað verður fyri móttøku umborð á Westward Ho, sum seinastu nógvu árini hevur ligið við bryggju í Vågen. Føroyska tjaldið og móttøkan umborð á Westward Ho eru vorðin ein afturvendandi og týdningarmikil partur av messuni í Stavanger, sum nógvir av okkara samstarvsfeløgum fegnast um.

Arktis

Nógv verður gjørt burturúr menningarmøguleikum, sum taka seg upp í samband við at ísurin bráðnar í Arktis og stór landa- og sjóøki gerast atkomilig.

Millum teirra, sum hava lagt nógva orku í hetta, eru russar og kinesarar, sum eru í ferð við at byggja út ein infrastruktur í samband við skipaferðslu, sum so smátt er farin at taka seg upp úr Asia og norður um Rusland til Europa um summarið.

Mett verður, at tað ber til at spara upp til 40% í tíð og orku við at brúka hesa farleiðina. Ferðslan mennist tó spakuliga og verður neyvan týðandi fyrrenn um 10 til 20 ár, men tá ræður eisini um at hava staðsett Føroyar skilagott í tí høpinum.

Tí mælir Oljuvinnufelagið til, at Føroyar eisini taka lut í Arctic Economic Council fyri at gera vart við okkum í menningartilgongdini.